

TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL D4-D — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: JG 287 Km: 140.000
Árgangur: 25.02.02

Kr. 145.000,-



TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL SEDAN — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: VA 671 Km: 50.000
Árgangur: 18.06.03

Kr. 198.000,-



CITROEN C5 EXCLUSIVE V6 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: VA 620 Km: 42.000
Árgangur: 12.06.03 Seinast sýnaður: 12.06.03

Kr. 185.000,-



TOYOTA TOYOTA CAMRY 2,2 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: BS 549 Km: 150.000
Árgangur: 07.09.99

Kr. 148.000,-



TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA

Skrásetingarnr: VD 459 Km: 94.000
Árgangur: 21.04.99 Seinast sýnaður: 23.05.05

Kr. 57.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: PB 060 Km: 48.000
Árgangur: 26.08.03

Kr. 205.000,-



FIAT DABLO 1,2 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: GT 992 Km: 79.000
Árgangur: 04.04.02

Kr. 85.000,-



SKODA OCTAVIA 1,6

Skrásetingarnr: FJ 392 Km: 78.000
Árgangur: 01.12.00 Seinast sýnaður: 20.08.04

Kr. 65.000,-



FIAT STILO — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: MG 883 Km: 48.000
Árgangur: 01.07.02 Seinast sýnaður: 21.02.06

Kr. 95.000,-



HONDA ACCORD 1,6 SEDAN

Skrásetingarnr: EH 667 Km: 150.000
Árgangur: 29.08.00 Seinast sýnaður: 21.09.05

Kr. 78.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanfrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.




*Eyðgerð Kruse, forkvinna í Føroya Blaðmannafelag, handaði Jón Brian Hvidtfeldt eina karikaturtekning, tá hann leygardagin varð kosin ársins journalistur 2007*

# Jón Brian Hvidtfeldt er ársins journalistur

**Fakfestivalurin sum Synergi skipaði fyri leygardagin, valdi sær Jón Brian Hvidtfeld sum ársins journalist 2007**

FJØLMIÐLAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Jón Brian Hvidtfeldt er ársins journalistur 2007. Tað hava fjølmiðlafólk, sum vóru á skeiði hjá Synergi um vikuskiftið, gjørt av.

Synergi skipaði leygardagin fyri skeiði um kritiskan journalistikk á Hotel Hafnia. Í hesum sambandi høvdu fjølmiðlafólkini møguleika fyrst at innstilla og síðani at kjósa ársins journalist.

Sambært Synergi verður prísurin Ársins Journalistur verður latin einum fjølmiðlafólki, sum í serligan mun hevur víst initiativ og talent senasta árið.

Innstillað vórðu fýra starvsfólk úr útvarpinum og eitt av Dimmalætting:

Dagmar Joensen Næs, útvarpið
Høgni Djurhuus, útvarpið
Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpið
Óluvá Zachariasen, útvarpið
Jan Lamhauge, Dimmalætting

- Eg havi verðins bestu starvsfelagar og eitt sera gott arbeiðspláss. Tí eiga tey eisini heiðurin fyri, at eg er kosin ársins journalistur, segði Jón Brian Hvidtfeldt, tá Eyðgerð Mørkøre, forkvinna í Føroya Blaðmannafelag hevði handað honum heiðurin – eina karikaturtekning, sum Janus Guttesen hevði teknað.

Jón Brian Hvidtfeldt varð útbúgving journalistur á Danmaks Journalisthøjskole í 2004. Síðan tá hevur hann starvast í útvarpinum. Í praktikktíðini var hann eisini í útvaprinum og á Sosialinum.

Jón Brian Hvidtfeldt segði, at tað hvønn dag er stuttligt at koma til arbeiðis í útvarpinum. Umframt at takka øllum starvsfeløgunum, so fekk Dánjal Højgaard, sum seinast varð kosin ársins journalistur, eina serstaka tøkk frá honum fyri stuðul og lærdóm.

- Eg havi rokkið setningin, eg setti mær, tá eg fóru undir at útbúgva meg sum journalist, hóast lønin ikki er nakað at reypa av, segði hann.

## Nógv fólk og friðarligt

Veðrið var av tí besta og lønirnar eru stutt síðani komnar og alt talaði fyri eini lívligari nátt í havnargøtu, nú uppundir heilidagin.

Tað var eisini rættiliga nógv fólk í býnum, men løgreglan sigur,at tað var sera friðarligt.

Ein handilsrútur varð brotin í Grím Kambansgøtu og ein rútur hjá P.A. Restorffs beint við, men onki varð stolið

Annars hevur løgreglan fingið fráboðan um, at ein maður fekk framman á í einum danistaði í Havn í nátt, men skaðin var ikki stórur og løgreglan veit, hvør hevði sligið, so hann kann vænta sær at fáa politist at banka upp á.

**-aki-**